# Sera nógv av skafti, hóast rumbul

BJØRT SAMUELSEN
landsstýriskvinna



Í einari analysu av politisku støðuni 19. august kemur Dimma til ta niðurstøðu, at "landsstýrið púrt einki hevur avrikað". Hetta er ein tunn og populistisk analysa, har blaðmaðurin skilliga byggir sína niðurstøðu á tað rumbul, sum tíverri verið hevur, og als ikki á tey mongu mál, henda samgongan longu hevur framt - men sum hava fingið lítið av uppmerksemi. Her eru nøkur teirra:

**Nógv stig ...**
Vit hava longt barnsburðarfarloyvið við 8 vikum. Ikki júst einki fyri føroyskar barnafamiljur. Vit hava dagført vinnulóggávu og sett í verk tryggingarlóggávu, ið er grundarlagið undir at víðka virkismøguleikarnar hjá okkara tryggingarvinnu. Vit hava tikið stig til at gera Føroya Altjóða Skipaskráseting (FAS) kappingarføra, soleiðis at hetta veruliga gerst ein inntøkumøguleiki fyri land okkara. Um fáar dagar verður stjóri settur á nýggja stovninum fyri FAS og Skráseting Føroya. Vit hava samtykt marknaðarføringslóg og verður Brúkaraumboðsmaður settur frá 1. januar. Vit hava fingið øll viðurskifti viðvíkjandi yvirtøkuni av Vága Floghavn upp á pláss, so útbyggingin nú loksins sleppur í gongd, og vit hava broytt lógina, so tað nú verður loyvt at hava tollfría sølu á flogvøllinum. Vit hava uppraðfest vinnugransking og íverksetan.

Tá tað snýr seg um tunlarnar, er eitt sera umfatandi útgreiningararbeiði gjørt, sum m.a. fevnir um fíggingarleistar og váðametingar. Eitt arbeiði, ið sjálvandi er púrasta grundleggjandi undir ætlanum at fremja so stórar íløgur í infrakervið.

**...og stór felags tøk**
Vit hava tikið størsta fetið nakrantíð ímóti møguleikanum at fáa góðkent okkara fiskiveiðu sum burðardygga.

Vit hava latið upp fyri útlendskari arbeiðsmegi og sett á stovn útlendingastovu, sum er eitt sera umráðandi tak fyri arbeiðsmarknaðin.

Á útbúgvingarøkjunum eru risa tøk tikin, har fleiri nýggjar hægri útbúgvingar eru settar í gongd, og miðnásskúlin í Marknagili verður nú veruleiki. Okkara Kringvarp fær loksins nýtt digitalt sendinet. Vit hava økt játtanina munandi til børn við serligum tørvi. Økt pláss til lærara- og pedagogútbúgvingarnar og setta stovn nýggj miðnámsskúlapláss í Eysturoynni til meira enn 70 næmingar

Endurgjaldsábyrgdarlógin er samtykt – hon hevur bíðað í meira enn 10 ár, og arbeiðsskaðatryggingarlógin, ið gevur arbeiðstakarum munandi betri trygd enn í dag, er á gáttuni. Játtanirnar til bæði mentanargrunn, tónleik og Tjóðpall eru øktar meira enn undanfarnu 4 árini – hóast hetta ikki er nóg mikið.

Nú frá 1. sept. fáa stakir uppihaldarar barnaískoyti á 6000 kr. fyri hvørt barnið. Økisdepil og sambýli til sinnisveik eru samtykt. Vit hava stovnsett eitt uttanríkisráð at røkja okkara altjóða vinnuligu, mentanarligu og politisku áhugamál, og gongd er komin á EFTA-málið.

**Sakligan kritikk, takk**
Hetta var bara eitt úrval úr listanum yvir mál, ið eru framd síðani samgongan við Tjóðveldi, Javnaðarflokkinum og Miðflokkinum tók við í februar. Og listin yvir mál, samgongan, saman við Sjálvstýrisflokkinum, ætlar at fremja í hesi tingsetuni, er ikki styttri.

Tað er gott og rætt at Dimma, og pressan sum heild, eru kritisk til tað, sum er farið fram í seinastuni, og sum vit als ikki kunnu vera errin av. Men tað er alt annað enn rímiligt yvirfyri Føroya fólki at póstanda, at vit hava sitið hendur í favn í eitt hálvt ár. Veruleikin er jú ein heilt annar!

# Gevið skilsemi og skynskemi møguleika í føroyskum politikki

JAN ASBJØRNSON JOENSEN
Landsnevndarformaður
Sjálvstýrisfloksins

So turrislig og konservativ yvirskriftin ljóðar, so hava Sjálvstýrisflokkurin og samgongan onkursvegna sagt, at hesi skulu valda á Føroya Løgtingi.

Fólkið aftur til valdið: Síðan 1970'unum hevur fólkavalda Føroya Løgting givið meir og meir vald frá sær til umsitingarliga landsstýrið. Síðan kreppuárini og serliga síðan vit fóru frá kollegialum- til ráðharrastýri, hevur eisini landsstýrið givið meira og meira vald frá sær til lítla skaran av embætisfólki.

Eingin politikkur er í politikkinum í Føroyum! Hugsið bert um, at skal støða takast til okkurt politiskt mál, so verður minst ein kanningarnevnd sett, mannað av lítlu fjøldini av embætisfólkum og seráhugamálum. Er málið heilt alvárligt – skulu mørk flytast ella okkurt munagott ásetast - so verður serkøn hjálp funnin millum serkønu serðfrøðingarnar í býnum (tí ávísa eina býnum). Altso teir við somu útbúgving sum tey í fyrisitingini, men sum fáa meira burturúr at verða serfrøðingar í tí privata – og tá dálkar sjálvandi heldur eingin politikari hendurnar! Men heldur eingin polikkari hevur víst seg at hava nakra meining ella fatan ella týðandi viðmerking. Politikkurin hjá okkara politikarum er at vera fólkavaldur at taka ímóti serfróðum politikki.

Burtur við skotgrøvunum: Gangi út frá, at øll í veljaradyggumaldri vita at tey Tingfólk sum seinastu 40-50 árini, ikki hava verið partur av samgonguni- eins væl kundu havt heimaarbeiðspláss.

Samgongan fær síni uppskot samtykt – andstøðan fær síni uppskot feld.

Traditionen tro hava føroyskir politikarar- og veljarar hugsað at hetta má so vera.

Men soleiðis nýtist ikki at verða.

Søguligt preludium: Flestu munnu ásanna, at við endurføðingini av ávísum gomlum politikarum í samband við endurskapanina av vallógini, hava vit higartil bert skapt enn fleiri politiskar trupulleikar - heldur enn betur politikarar soleiðis sum endamálið við broytingini segðist at vera.

Søguligt nýbrot! Minnilutastjórn við samstarvsflokki?

Samgongan hevur saman við Sjálvstýrisflokkinum gjørt av at troyta nýggjar leiðir í føroyskum politikki.

Fyrstu ferð í politisku søgu føroya fara vit at royna eina veruliga og virkandi minnilutastjórn (onkuntíð hevur stjórn sitið heilt stutt í minniluta, t. d. Edmund løgmaður, eftir at hava blakað Sjálvstýri út fyri at vera ov hugað fyri Vágatunnlinum). Hetta setur stór krøv til politiska førleikan.

Hetta setur størri politisk krøv enn bert at grenja í teimun fjølmiðlunum, ein sum floksformaður sleppur framat – nú hava øll skilagóð mál kjans at koma ígjøgnum!

At bjóða seg fram at stýra fólkinum krevur eisini at tú torir at velja ótroyttar gøtur!

Sjálvstýrisflokkurin valdi at hava dirvi – Løgmaður og samgongan valdu at hava treysti.

Andstøðan við: Vit standa fyri stórum avbjóðingum fyri Føroya fólk. Tá er ikki nóg mikið bert at hugsa um mín flokk – um meg og míni.

Eg vil staðiliga heita á samgongu og Sjálvstýrisflokkin um at lurta eftir andstøðuni – og mest møguliga søkja breiða undirtøku á tingi um týdningarmikil mál.

Gamalt er, at blind høna kann leggja gullegg, og um Kaj Leo ella Jørgin leggja fram uppskot, eigur samgongan at virða fólkaræðið so mikið, at uppskotini verða viðgjørd í størsta álvara. Hetta vildi verið annað nýbrot í føroyskum politikki. Longu viðgerðin av uppskotinum um økta játtan til eltuítróttina og uppskotinum um verjulógina benda tann vegin, at Føroya Løgting samstarvar – og Føroya Løgting rædur!

Soleiðis sum e.n. dagaskipanin var viðfarin bæði av samgongu og andstøðu – hetta eigur ikki at koma fyri aftur á Føroya Løgtingi. Okkara kanska næsttýdningarmesta lóg verður blakað á ting úttan rímuliga viðgerð, harnæst verður lógin viðgjørd í umleið ein dag í Vinnunevndini. Soleiðis eigur alt tos um álvara, seriøsitet, fornuft ella virðing fyri vinnu fiskastovnum ella fólkaræði - at tagna í samband við hesa lóg.

Fyri føroyingar og Føroyar: Sjálvstýrisflokkurin hevur tikið støðu. Fyri flokkin vildi eitt nýval sjálvsagt borið okkum longur framá í atkvøðum. Men flokkurin hevur tikið ta avgerð, at politiska støðan beint nú krevur dirvi, og saman við samgonguni vilja vit vísa neyðuga áræðið fyri aftur at fáa føroyska fólkavaldið og politisku skipanina at virka.

Møguliga miseydnast royndin, møguliga fáa vit færri atkvøður afturfyri, men hetta er og eigur at verða Sjálvstýrispolitikkur – at tæna fólki og landi fram um egin áhugamál.

# Klaksvík tillukku: Gleðist um so vakran bý

SJÚRÐUR HANSEN
Gøta

Uttan mun til um tað er 100 ára hátíðarhald, so verður iva altíð eitt hátíðarhald í mínum sinni hjá Klaksvík. So ættbundin eg eri at hesum plássi, nú staðið verður ivaleyst nógv lagt fyri sum »fremmandaskald« at vita um til ber at finna henda máttin, duende, sum Gunnar talar um í samband við Trónd í Gøtu, sum er Klaksvík. Men bæði Janus Matras og Einar Mohr vóru her í oyggjunum, norðoyggjum, so…

# Blokkurin avtakast!

ZAKARIAS WANG



Eg hevði eina grein í bløðunum herfyri, har víst var á, at tann stuðul, Føroyar fáa frá Danmørk, er skaðiligur fyri livikor okkara. Hann rakar hart tey bleytu virðini!

Eingin hevur roynt at víst hesi framløgu míni aftur. Tey, sum skil hava, hava sostatt tikið undir við henni, og tað er at fegnast um.

Eftir er so at seta hetta í verk.

Nú fara danir at gera fíggjarlóg fyri árið 2009. Vit hava tvey umboð í tí fólkatingi, sum skal samtykkja fíggjarlógina.

Kunnu vit ikki við rímuligheit krevja av hesum umboðum okkara, at tey forða dønum í at halda fram við at gera okkum skaða við at senda okkum blokkin? Gera tey, sum vit hava sett okkara álit á, ikki tað, so verða tey medsek í teimum vanlukkum, sum blokkurin fær út yvir okkum.